*Kavingin eftir jólaskipinum:*

# Ørskapur at fara so djúpt

*Fólk, sum kenna til kaving, siga, at tað er ørskapur at kava á 100 metra dýpi. Kavararnir kunnu seta seg sjálvar í beinleiðis lívsvanda, við at fara á slíkar dýpdir, sigur Jens Mortensen, sum er instruktørur á kavaraskúlanum hjá donsku marinuni*



*– Kavararnir kunnu seta seg sjálvar í beinleiðis lívsvanda, við at fara á slíkar dýpdir, sigur Jens Mortensen, sum er instruktørur á kavaraskúlanum hjá donsku marinuni*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fyrrapartin í gjár fóru kavararnir fyri fyrstu ferð niður eftir vrakinum av jólaskipinum, sum liggur á umleið 90 metra dýpi. Av tí, at kavararnir ikki vóru á rættari kós, komu teir heilt niður á 95 metra dýpi, og hjá teimum, sum kenna til kaving, er tað fullkomin ørskapur at fara niður á slíkar dýpdir, uttan eitt nú at hava trýstkamar á staðnum, har kava verður.

**Frítíðarkavarar sleppa undan**

Nú er tað soleiðis, at kaving í Føroyum er regulerað við lóg frá 1992, sum seinast er broytt í 1996. Henda lógin viðgerð bara vinnuligar kavarar, og teir fáa heilt einfalt ikki loyvið til at kava djúpri enn 50 metrar.

Hjá frítíðarkavarum er tað øðrvísi, tí hvørki í Føroyum ella í Danmark, er tað nøkur lóg, sum sigur, hvussu djúpt teir kunnu kava. Og sum Sosialurin skilir, so kemur tað rættiliga ofta fyri, at frítíðarkavarar fara djúpri enn teir 50 metrarnar. Væl djúpri.

Hvussu teir gera við trygdina, er latið upp til teir sjálvar at avgerða.

Kavaraverkætlan 2000, sum er tann bólkurin, sum kavar eftir jólaskipinum, hevur havt samband við myndugleikarnar. Trýstkamarið hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni stendur tøkt, um so er, at onkur av kavarunum fær kavarasjúkuna, men sambært fólki við royndum, so er tað fullkomiliga burturvið, at trýstkamarið stendur so langa leið frá staðnum har kava verður.

**Sjóvinnustýrið hevði sagt nei**

Í Danmark er tað Søfartsstyrelsen, sum hevur ábyrgdina av vinnuligu kavarunum. Har verður sagt, at trygdarkrøvini eru ógvuliga strong tá kavarar fara á djúpt vatn. M. a. skulu kavarar í trýstkamar í seks tímar, eftir at teir hava verið á djúpum vatni.

Palle Christensen, frá Søfartstyrelsen, sigur, at fingu teir eina umsókn um at sleppa niður á knappliga 100 metrar, so hevði hon verið avvíst. Hann vísir á, at tað er beinleiðis vandamikið at ferðast á so djúpum vatni, tí tað er so kropsliga krevjandi.

- Ein kavari, sum fer á so djúpt vatn, kann bert arbeiða í nakrar fáar minuttir, og tí er tað sera dýrt, tá talan er um vinnuliga kaving. Tì verða robottar brúktir til slíkar uppgávur.

Tá vit spyrja hann um hansara meting av trygdini hjá kavarunum, sum nú kava í Føroyum segði hann, at tað er vitleyst, at kava við Fugloynna, og at hava eitt trygdarkamar í Havn.

- Frástøðan er alt ov long, og tað kann vera beinleiðis lívshættisligt um kavararnir gerast sjúkir.

Palle Christensen vísir eisini á munin millum frítíðarkaving og vinnuliga kaving og sigur at tað er næstan frítt val hjá frítíðarkavarum, at seta lívið í vága á henda hátt.

- Tú skalt minnast til, at tað er vágið, at fara niður á 90 til 100 metrar, men fara teir inn í skipið og okkurt hendir, so er einki at gera. So er eingin hjálp at heinta, sigur Palle Christensen.

**Serfrøðingarnir øtast**

Danska útvarpið bar í gjáramorgunin tíðindini um kavingina eftir Jólaskipinum á Fugloyarfirði. Hesi tíðindini hoyrdi Jens Mortensen, sum er instruktørur hjá donsku marinuni og hann sigur bart út, at hann øtast at teir taka ein sovornan kjans.

- Fær ein kavi kavarasjúkuna, so hevur hann ikki ein livandi kjans, at klára túrin heilt til Havnar, var hansara meting av frástøðuni millum Fugloyarfjørð og trýstkamari í Havn.

Kavararnir, sum fáa útbúgving hjá donsku marinuni, ganga undir somu treytum, sum aðrir vinnuligir kavarar og tað merkir, at teir sleppa ikki niður um 50 metrar við teirri útbúgvingini.

Jens Mortensen greiðir frá, at teir, tá teir kava á djúpum vatni — upp til 50 metrar — brúka kavaraklokku, og teirra kavarar fara beinleiðis í trýstkamari tá teir koma upp.

- Vit hava ein regul, sum sigur, at frá tí at kavarin steðgar í vatninum seinastu ferð og til hann er í kamarinum og trýstið í kamarinum er sum niðri á 18 metrum, skulu í mesta lagi ganga fimm minuttir. Og tað er eingin vegur uttanum. Her skulu teir als ikki í trýstkamar. Tað fati eg ikki, sigur hann.

**Landssjúkrahúsið til reiðar**

Tí læknaliga í sambandi við trýstkamarið hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni, tekur Hans Jacob Simonsen, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum sær av. Hann og nakrar sjúkrasystrar eru útbúgvin at arbeiða við trýstkamarinum, og tey eru til reiðar, skuldi nakað hent.

- Vit hava havt venjingar í trýstkamarinum og eru tøk, skuldi óhappið hent, sigur hann.

Hann er ikki so bangin fyri, at tann stóra vanlukkan hendir, tí tað ger hon sjáldan, greiðir hann frá. Kavarasjúkan kemur sum oftast spakuliga, og tí hevur tað, sambært honum, ikki so stóran týdning um frástøðan er tann hon er.

Kortini skilir hann serfrøðingarnar, sum ógvast við trygdarviðurskiftini.

- Tað er klárt. Fær ein kavari ógvusliga kavarasjúku, so kann tað enda rættiliga galið, og tað er sjálvandi møguligt, tí teir arbeiða undir ekstremum viðurskiftum, sigur Hans Jacob, sum er eitt sindur óttafullur, skuldi okkurt álvarsamt hent.

Trýstkamarið hjá V&B kann fáa fólk »niður« á umleið 50 metrar og læknin heldur, at hetta er nóg mikið.

- Tá vit hava fingið sjúklingin inn í trýstkamarið, so viðgera vit hann meðan trýstið verður sett á. Hann verður kannaður væl og virðiliga, og so fylgja vit gongdini meðan vit fara »niðureftir«. Tað er heldur ikki altíð, at vit skulu so langt niður. Ofta vísir tað seg, at 10-12 metrar er nóg mikið til at fáa sjúkuteknini burtur og so leggja vit trýstið har. Men sjálvandi skal ein ongantíð siga ongantíð, og tað kann gerast neyðugt at fara nógv longur. Men vit fara ikki niður um 50 metrar, sigur hann.

**At seta seg sjálvan í vanda**

Niðurstøðan av tí, sum vit hava fingið burturúr prátinum er, at tey, sum kenna til kaving, halda tað, sum fer fram í Fugloyarfirði verða reinan ørskap.

Trygdarviðurskiftini í sambandi við kavingina eru ikki nóg góð, tá hugsað verður um eitt nú trýstkamarið og tað er vitleyst, at senda fólk niður á hundrað metrar.

Hinvegin er eingin lóg, sum forðar Kavaraverkætlan 2000 at gera tað teir gera. Lógin umfatar bara vinnuligar kavarar, og tað sum Kavaraverkætlanin ger er ikki vinnuligt. Var tað so, at kavararnir vóru bidnir at koma til Føroya at loysa uppgávuna, so var tað vinnuligt, men tað eru teir ikki. Teir eru partur av einum áhugabólki og teir sigur lógin einki um.

Men tey, sum Sosialurin hevur tosað við, siga, at teir seta seg í sera álvarsaman vanda við at kava so djúpt.

# Gongur striltið at finna tað aftur

*Kavararnir fóru niður aftur í gjáramorgunin at leita eftir Jólaskipinum, men enn einaferð komu teir aftur tómhentir. Einki var at finna, hóast útslagið á ekkoloddinum var fínt har boyan varð sett út*

SVEINUR TRÓNDARSON

Kavararnir, sum leitað eftir Jólaskipinum, hava fingið trupulleikar. Hósdagin vóru kavarnir niðri á 95 metra dýpi, men har var einki at finna. Boyan, sum var sett út kvøldið fyri hevði slitið, og tí var ivi um teir vóru á rættari positión ella ikki.

Í gjáramorgunin royndu teir so aftur, men úrslitið var tað sama. Vrak var einki at finna, hvørki har sum boyan var sett út, ella har nærhendis. Tað er nevniliga rættiliga trupult hjá kavarunum at gera nakað, um so er, at boyan ikki er sett út, har vrakið liggur, tí tíðin kavararnir kunnu vera á botni, er so stutt.

Tí var einki annað at gera, enn at koma uppaftur.

**Positiónin skeiv**

Sum Sosialurin skilir, so snúgva trupulleikarnir seg í høvuðsheitum um positiónina. Tað var Tjaldrið, sum fann Jólaskipið í august mánað í fjør. Tá hevði skipið eina aðra GPS skipan umborð enn teir hava nú, og koordinatarnir fyri positiónini eru øðrvísi enn teir eru í nýggju skipanini.

Hóast fyrireikararnir hava fingið upplýst nýggju koordinatarnar, so eru teir eftir øllum at døma ikki so neyvir, sum hinir vóru, og tí hava kavararnir enn ikki rakt vrakið.

- Vit leitaðu við Dragabergi í gjárkvøldið og fingu eisini eitt greitt útslag, sum vit hildu vera vrakið, men tað hevur tað so eftir øllum at døma ikki verið kortini, sigur ein av manningini úr Hvannasundi.

*Hvat er so til ráða at taka?*

- Dragaberg er úti á positiónini nú og leitar, og vit væntað at seta eina nýggja boyu út seinni í dag.

*Nær kava tit so aftur?*

- Tað verður nokk ikki fyrr enn í morgin. Hitt liðið kundi farið niður seinnapartin, men vit hava valt at lata vera. Tað loysir seg ikki at fara niður, um einki verður funnið kortini.

**Sjókagin enn einaferð**

Tá Jólaskipið varð funnið, sendi manningin á Tjaldrinum sjókagan niður, og hann vísti greitt, at teir vóru á rættari leið.

Fara tit so at royna at fáa fatur á sjókaganum enn einaferð?

- Tað hevði verið vert at royna við honum aftur. Eg haldi, at teir arbeiða við tí málinum, men eg veit ikki um tað ber til, ella hvussu tað gongur.

*Hvat siga kavararnir?*

- Var tað ikki fyri teirra góða hýr, so var verkætlanin steðgað. Teir hava enn gott mót og vilja fegnir geva tí nakrar møguleikar enn. Tí hava vit valt at halda á, sigur ein av fyrireikarunum úr Hvannasundi.

Vit kunnu tó staðfesta, at tað so ikki varð kavað eftir vrakinum av Jólaskipinum seinnapartin í gjár, tí sum tað sá út tá, so var skipið horvið.



*Heri Andreassen, fyrireikari:*

# Kavararnir nøgdir við trygdina

*Maðurin, sum av fyrstan tíð tók stig til kavingina eftir Jólaskipinum, vísir aftur, at trygdin hjá kavarunum ikki er í lagi. — Kavararnir hava sjálvir góðkent trygdarviðurskiftini, og tá teir hava royndir at kava á djúpum vatni, so góðtaki eg tað, sigur Heri Andreassen*



*Kavararnir eru nøgdir við trygdina, sigur Heri Andreassen*

SVEINUR TRÓNDARSON

- Eg eri samdur við teimum í, at tað er á ógvuliga djúpum vatni, men kavararnir hava sjálvir sagt, at trygdin er í lagi, og eg trúgvi teimum, sigur Heri Andreassen, fyrireikari, í sambandi við, at fleiri, sum kenna til kaving, halda tað verða óðamannaverk, at fara á so djúpt vatn.

Heri Andreassen vísir á, at Kavaraverkætlan 2000 hevur gjørt eitt stórt kanningararbeiði, sum gav tað úrslit, at tað ikki er nøkur lóg, sum forðar teimum í at takast við tað teir gera, og at tað heldur ikki vera sett serlig trygdarkrøv í sambandi við kavingina.

- Kortini hava vit sett okkum í samband við Vaktar- og Bjargingartænastuna um trýstkamari og vit hava eisini tosað við myndugleikarnar um tyrluna, um so er, at tað gerst brúk fyri henni. Hetta siga donsku kavararnir er nóg mikið, og teimum trúgvi eg, tí teir vita hvat teir tosa um, tí teir hava kavað á sera djúpum vatni fyrr, sigur Heri Andreassen.

Onkur av kavarunum hevur verið á 132 metra dýpið fyrr, og í tí førinum stóð nærmasta trýstkamar longri burtur enn tað ger í dag, leggur hann afturat.

**Ikki vinnuligt**

Í lógini um vinnuliga kaving stendur, at kavar tú og fært løn afturfyri, ella gert tú eitt arbeiði fyri ein annan uttan løn, so er talan um vinnuliga kaving. Tí spurdu vit Hera, um hetta ikki er vinnulig kaving, nú hann hevur fingið danskar kavarar til Føroya.

- Tað er tað ikki talan um, tí vit eru allir í sama bólki. Eg havi ikki fingið teir til Føroya at arbeiða fyri meg, men vit hava gjørt eina kavaraverkætlan, har vit allir eru við. Tá er ikki talan um vinnuliga kaving, greiðir Heri frá.

Hann leggur afturat, at teir áðrenn teir fóru í holt við uppgávuna, gjørdu nógv fyri at kannað tann løgfrøðiliga partin av tiltakinum, fyri at alt skuldi vera í lagi.

- Vit hava jú fingið einkarrætt frá Fiskimálastýrinum, at taka lutir frá skipinum, sigur Heri.

*Men er tað so eisini orsøkin til at tit hava gjørt bólkin saman, ístaðin fyri at tú fekk menninar at koma til Føroya?*

- Tað er ein orsøk, sigur Heri Andreassen.

Hann vendir aftur til trygdina og vísir á, at tað hevði verið ómøguligt, at havt trýstkamar á staðnum, tí umstøðurnar loyva tí ikki. Hitin skal vera støðugur og tað er hann ikki umborð á skipi, uttan alt verður so øgiliga kostnaðarmikið.

**Aðrir høvdu gjørt tað sama**

Kortini skal tað ikki ljóða, sum eru hesir kavararnir teir einastu, sum glaðbeintir fara á hundrað metra dýpi.

Aðrir kavarar, sum Sosialurin, hevur tosað við, at teir høvdu ikki farið niður á hatta dýpi við vanligari útgerð, men høvdu teir ta útgerðina, sum krevst, so høvdu teir ikki blunkað við, at farið niður.

- Í mínum eygum er tað ikki alneyðugt at hava trýstkamar nærhendis har kavað verður, tí fylgir tú teimum reglum, sum eru, og brúkar tú tær talvur, sum eru til slíkt endamál, so kemur tú bæði niður og uppaftur uttan at fáa kavarasjúkuna, sigur ein teirra.

Ein annar kavari sigur, at tað er ein spurningur um at vísa virðing fyri dýpdini, men at tað saktans lata seg gera. — Eg hevði í hvussu so ikki ivast, um eg fekk møguleikan. Tað er ikki oftari enn so, at eitt slíkt høvi býðst, men tað krevur sjálvandi, at tú hevur røttu útgerðina og at tú hevur virðing fyri reglunum fyri kaving, sigur ein annar kavari.

Hvørgin teirra hevði óttast fyri at kava, hóast trýstkamar ikki er staðnum.

Til seinast kunnu vit leggja afturat, at tað ikki er kostnaðarleyst at kava. Fyrireikararnir hava fingið nógvan stuðul frá ymsum fyritøkum. Heri Andreassen sigur, at teir hava fingið tað, sum svarar til 150 túsund krónur í stuðli, og tað eru teir takksamir fyri.

— Annars hevði tað neyvan borið til at kava, sigur hann.

# Børn fáa foreldur at leggja av at roykja...



*Í bólkinum upp til 7 ár vann Dagmar M. Winther í Havn*




*Í bólkinum upp til 10 ár vann Rasmus Steintórson í Klaksvík*

EIRIKUR LINDENKSOV

Í sambandi við altjóða roykfría dagin, sum verður komandi mikudag 31. mai, skipaði Tubbaksráðið fyri teknikapping millum børn. Týsdagin var freistin úti og komu inn 103 tekningar.

Ein dómsnevnd við Páll Danielsen, Vár Jacobsen og Eli Smith hevur kosið tríggjar vinnarar.

Í bólkinum upp til 7 ár vann Dagmar M. Winther í Havn.

Í bólkinum upp til 10 ár vann Rasmus Steintórson í Klaksvík.

Í bólkinum upp til 14 ár vann Barbara á Dunga í Havn.

Í Almanna- og Heilsumálastýrinum, sum vegna Tubbaksráðið hevur skipað fyri kappingini, fegnast tey um undirtøkuna, og vóna tey, at børnini við hesum tekningunum kunnu fáa foreldrini at leggja av at roykja.

Tey, ið vilja síggja fleiri tekningar kunnu hyggja á heimasíðuna hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum: www.ahs.fo




*Í bólkinum upp til 14 ár vann Barbara á Dunga í Havn*





Vinarliga send mær:

______ eintøk av "Malan", á kr. 159.-

Navn: ______

Búst.: ______

Útfyll lepan, klipp hann út og send hann til: **3-arin, Postboks 1057, 110 Tórshavn**